# Tónleikarar á veg á konsert í Fuglafirði og í Havn

**Mentanarhúsið í Fuglafjørð hóskvøldið 18. mars kl. 20.00**
**Norðurlandahúsið sunnudagin 21. mars kl. 16.00**



TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Væl hevur gingist í hond á konsertunum nevndar »Tónleikarar á veg« kring landið hjá teim ungu tónleikaspírunum úr Musikkskúla Miðnámi, ið Hedvig Westerlund-Kapnas í Norðurlandahúsinum, saman við Tórshavnar Musikkskúla, hevur skipað fyri í vetur.

- Nú fer komandi ættarliðið av tónleikarum at vísa okkum, hvat ið fyriferst hjá tónaskøldunum, ið skriva tónleik í dag. Spildurnýggjur tónar, beinleiðis skrivaðir til ljóðførini hjá ungu solistunum, framførdir á palli fyri fyrstu ferð. Einki minni, sigur Norðurlandahúsið í tíðindaskrivi.

Harafturat fara tey at framføra tónleik fyri kór, m. a. eina serstøk útgáva av lagnum »Tú« hjá Terja Rasmussen. Hetta, í spennandi útseting hjá fyrrverandi musikkskúlanæminginum Tróndi Bogasyni, ið sum tónaskald hevur miklan framburð uttanlands.

Einki løgið, at ungu tónleikaspírarnir knappliga leggja ljóðførini frá sær og lata røddina ljóma og framføra nakrar kórsatsir. Røddin er fremsta ljóðførið, ið okkum er givið, Sum liður í útbúgving teirra sum tónleikarar, so skulu tey eisini læra at nýta røddina, og hevur Musikkskúla Miðnám sjálvandi eitt væl mannað kór við ungum, góðum røddum.

Skráin er fjølbroytt. Ungu tónaskøldini lata seg ikki so lætt binda niður í stíli og heitum, ið vit alt ov ofta royna at smoyggja omanyvir tónleik, so tit kunnu vænta tykkum eina spenandi løtu í Mentanarhúsinum hóskvøldið 18. mars kl. 20.00 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin 21. mars kl. 16.00.

Sunleif Rasmussen stjórnar tónleikinum. Konsertin varir í slakan tíma.

**Tónleikarar:** Maria Heinesen, Ragnar F. Andreasen, violin – Pól Jespersen, bratsj - Anna á Váli Smith og Kristina á Váli og Rúni Bláfoss, sello – Irena Á. Joensen, klarinett – Sissal Magnussen, fagott – Rúni Hentze, trompet – Birita Mortensen, euphonium – Jens Knudsen, trombon - Oluf Dam og Jósef Heilmann, klaver – Alvi Joensen, guitar - Jan Rúni Poulsen, trummur – Ísak Petersen, bass.
**Tónaskøld:** Sámal Jákup Jakobsen og Ólavur Larsen
Miðnámskórið MUMI
**Samskipari:** Ólavur Jakobsen

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landnyrðingi og norði og regn ella ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í ein strúk av landnyrðingi, sunnudagin minni vindur av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -12 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -6 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | -1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -6 |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | -1 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 18 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 6 |
| Miami | 13 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 980 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰ – 15/03 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,6°
Minsti hiti máldur í mars: -11,0° -
Mesti hiti máldur í mars: +11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 14/03 kl. 06⁰⁰ – 15/03 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mars: 38 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 12. mars | Mánin longst frá jørðini |
| 15. mars | Tendring |
| 23. mars | Fyrra kvarter |
| 28. mars | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. mars | 06:49 | 19:07 | 05:49 | 18:07 | 06:04 | 18:22 | 08:49 | 21:07 | 09:49 | 22:07 | 05:04 | 17:22 | 04:04 | 16:22 | 07:04 | 19:22 | 08:04 | 20:22 | 06:34 | 18:52 | 07:49 | 20:07 |
| 17. mars | 07:25 | 19:44 | 06:25 | 18:44 | 06:40 | 18:59 | 09:25 | 21:44 | 10:25 | 22:44 | 05:40 | 17:59 | 04:40 | 16:59 | 07:40 | 19:59 | 08:40 | 20:59 | 07:10 | 19:29 | 08:25 | 20:44 |
| 18. mars | 08:03 | 20:23 | 07:03 | 19:23 | 07:18 | 19:38 | 10:03 | 22:23 | 11:03 | 23:23 | 06:18 | 18:38 | 05:18 | 17:38 | 08:18 | 20:38 | 09:18 | 21:38 | 07:48 | 20:08 | 09:03 | 21:23 |
| 19. mars | 08:44 | 21:05 | 07:44 | 20:05 | 07:59 | 20:20 | 10:44 | 23:05 | 11:44 | - | 06:59 | 19:20 | 05:59 | 18:20 | 08:59 | 21:20 | 09:59 | 22:20 | 08:29 | 20:50 | 09:44 | 22:05 |
| 20. mars | 09:28 | 21:51 | 08:28 | 20:51 | 08:43 | 21:06 | 11:28 | 23:51 | 00:05 | 12:28 | 07:43 | 20:06 | 06:43 | 19:06 | 09:43 | 22:06 | 10:43 | 23:06 | 09:13 | 21:36 | 10:28 | 22:51 |




